## Styðja Abbas

Teir flestu palestinararnir styðja Mahmoud Abbas, sum herfyri varð valdur til tann fyrsta forsætisráðharran í teimum níggju ára gomlu palestinsku sjálvstýrisøkjunum.

Ein meiningakanning vísir, at 64 prosent av teimum spurdu styðja Abbas. 70 prosent svaraðu, at hann eigur at fara undir friðarsamráðingar við Ísrael sum skjótast, men bert 39 prosent halda, at tað fer at eydnast honum at fáa tamarhald á teimum víðgongdu felagsskapunum og at fáa teir at ganga undir ein vápnahvíldarsáttmála.

Sambært kanningini halda 43 prosent av palestinunum, at Mahmoud Abbas er førur fyri at vinna sær álit ímillum palestinar, og tey halda eisini, at skipanin við einum forsætisráðharra fer at gera støðuna hjá Yasser Arafat, forseta veikari.

## Stuðla krígnum

Bretar hava eina heilt aðra uppfatan av krígnum í Irak nú, enn teir høvdu, áðrenn kríggið byrjaði.

Tá vóru nógvir bretar ímóti, at Bretland skuldi senda hermenn til Irak at hjálpa amerikanarunum at leypa á Irak, men nú siga 63 prosent av teimum spurdu í einari meiningakanning, at tey taka undir við, at Bretland hevur virkað við til at koyra stýrið hjá Saddam Hussein frá. Fyri einari viku síðani søgdu 56 prosent tað sama.

Miðskeiðis í februar vóru stórar mótmælisgongur í London ímóti krígsætlanini, og tá vístu meiningakanningar, at bert 38 prosent av bretunum tóku undir við ætlanini at leypa á Irak.

## Onnur ferðamál

Kríggið í Irak hevur stóra ávirkan á ferðavinnuna.

Á donsku ferðavinnustovunum verður sagt, at ferðaseðlasølan til Turkalands er minkað niður í helvt, samstundis sum áhugin fyri at halda summarfrí við Miðjarðarhavið er vaksin nógv. Ein av donsku ferðavinnustovunum, Star Tour, sigur, at har hava fólk serliga víst áhuga fyri at fara til oyggjar so sum Mallorca, Menorca, Kos og Kanarisku Oyggjarnar. Á hesum leiðunum verður neyðugt við eyka flogførum, meðan fleiri ætlaðar flogferðir til Turkalands í summar eru avlýstar ella útsettar.

Undir Flógvakrígnum í 1991 minkaði eftirspurningurin eftir frítíðarferðum næstan 50 prosent. Í sambandi við hetta kríggið er fyribils talan um 20 prosent minking, siga donsku ferðavinnustovurnar.

## Denktash hevur skyldina

ST-trygdarráðið gevur nú turkiska leiðaranum á Kýpros, Rauf Denktash, skyldina av, at einki kom burtur úr samráðingunum um at samskipa tann turkiska og tann grikska partin av oynni.

Øll tey fimtan limalondini í trygdarráðnum atkvøddu fyri einari samtykt, sum sigur, at Denktash gjørdi alt ov lítið fyri at fáa glið á samráðingarnar, og londini mæla honum til at fara aftur til samráðingarborðið. Kortini ásanna diplomatar hjá ST, at útlitini fyri einum nýggjum samráðingarumfari eru vánalig, tí hvørgin parturin tykist serliga hugaður fyri at taka samráðngarnar uppaftur.

ST-aðalskrivarin, Kofi Annan, kom fyri einum mánað síðani við einum uppskoti um at halda fólkaatkvøðu á Kýpros um at samskipa teir báðar partarnar, men hesum vísti Rauf Denktash aftur alt fyri eitt. Hann legði afturat, at hann fer ongantíð at ganga við til eina fólkaatkvøðu um sameining.

UTTAN ÚR HEIMI

# Rumsfeld ætlaði at leypa á Sýrialand aftan á Irak

**Verjumálaráðið Pentagon og Donald Rumsfeld, verjumálaráðharri ætlaðu at leypa á Irak, tá kríggið í Irak var av, men forsetin vrtakaði ætlanina**

KRÍGSÆTLANIR
*Árni Joensen*

Fyri nøkrum vikum síðani bað amerikanski verjumálaráðharrin, Donald Rumsfeld, nakrar av medarbeiðarum sínum í verjumálaráðnum Pentagon leggja eina ætlan um, hvussu USA skuldi leypa á Sýrialand, tá kríggið í Irak varð liðugt. Grundgevingin hjá ráðharranum var, at Sýrialand hevði latið Irak vápn, og tí landið skal hava samband við yvirgangsvirksemi.

Tað er bretska blaðið The Guardian, sum avdúkar ætlanina hjá Rumsfeld. Sambært blaðnum bað ráðharrin Doug Feith, varaverjumálaráðharra í politiskum viðurskiftum, og William Luti, leiðara á ætlanardeildini hjá Pentagon, leggja álopsætlanina. The Guardian vísir í hesum sambandi á, at longu í 1996 mæltu Doug Feith og aðrir republikanarar Ísrael til at gera eitt átak ímóti Sýrialandi.

Men ætlanin hjá Rumsfeld varð av ongum, tí George W. Bush, forseti steðgaði henni, skrivar The Guardian.

Seinastu dagarnar hava bæði Donald Rumsfeld og Colin Powell, uttanríkisráðharri ávarað Sýrialand ímóti at hýsa fyrrverandi irakskum leiðarum, og illgrunin um, at landið hevur hópoyðingarvápn, hevur eisini verið nevndur. Í gjár hótti Powell sýrar við diplomatiskum tiltøkum og handilstiltøkum, vil landið ikki samstarva, sum hann málbar seg.

Ísraelski forsætisráðharrin, Ariel Sharon, hevur eisini hert sínar atfinningar at Sýrialandi. Í gjár segði hann, at sýriski forsetin, Bashar al-Assad, er ein vandamikil maður, tí hann kann fara skeivur av maktjavnvágini millum Sýrialand og Ísrael.



*Donald Rumsfeld. Fyri nøkrum vikum síðani bað hann sínar embætismenn fyrireika álop á Sýrialand, men Bush steðgaði ætlan hansara.*

# SARS kann fara at krevja fleiri milliónir mannalív

**Herviliga lungnasjúkan SARS kann gerast ein líka deyðilig umfarssjúka sum spanskasjúka, ið kravdi millum 30 og 40 milliónir mannalív í árunum 1918 og 1919**

SARS
*Árni Joensen*

Tað heldur Kåre Mølbak, sum er yvirlækni á danska Serumstovninum.

Hann sigur, at fer SARS at breiða seg til tey fátækastu og tættast bygdu økini í Asia so sum India ella til Afrika, kann tað fáa ræðuligar avleiðingar.

Sum er doyggja millum trý og fýra prosent av teimum, sum fáa sjúkuna, og tað er ikki nógv meiri enn av einari vanligari influensu. Men fyritreytin fyri, at hetta er so, er, at sjúklingarnir fáa ta røttu viðgerðina. Rakar sjúkan øki, har heilsuverkið er vánaligt, verður myndin heilt ein onnur, sigur danski yvirlæknin.

Kåre Mølbak heldur, at tað er hesin vandin, sum hevur fingið alheimsheilsustovnin WHO at ráða fólki frá at ferðast til tey økini, har sjúkan gongur.

– Eitt eru tær heilsuligu avleiðingarnar av sjúkuni. Nakað annað er, at sjúkan eisini er tyngjandi fyri samfelagsbúskapin og heilsuverkið í teimum økjunum, sum verða meinast rakt av henni, sigur Kåre Mølbak.

WHO hevur higartil skrásett 3.169 tilburðir av SARS. 144 fólk eru deyð av sjúkuni, og 1.499 fólk fáa viðgerð, sigur WHO.



UTTAN ÚR HEIMI

# Etnisk útreinskan í Norðurirak

**Nógvir arábarar eru seinastu dagarnar tvingaðir at flyta úr bygdunum við býin Kirkuk har norðuri í Irak. Hildið verður, at fleiri túsund eru longu noyddir burtur haðani**

IRAK
*Árni Joensen*

Frágreiðingar, sum eru komnar úr Norðurirak seinastu dagarnar, siga, at kurdar hava rikið nógvar arábarar burtur úr fleiri bygdum á leiðini við býin Kirkuk. Amerikanska blaðið The New York Times vil vera við, at kurdarnir hava longu rikið fleiri túsund arábarar frá húsi og heimi.

Mannarættindafelagsskapurin Human Rights Watch sigur seg frá sínum medarbeiðarum í Irak, at í minsta lagi 2.000 arábarar eru riknir úr bygdum sínum.

The New York Times skrivar, at teir burturriknu arábararnir royna at lívbjarga sær sum frægast uttan fyri bygdirnar, sum teir eru riknir úr. Í nógvum førum er talan um bæði gomul og børn, sum einki hava at búgva í, og sum hvørki hava vatn, mat ella heilivág, skrivar blaðið.

Í sjálvum Kirkuk og bygdunum við býin búgva kurdar, arábarar, turkmenar og fleiri aðrir etniskir minnilutar. Stýrið hjá Saddam Hussein royndi at trýsta kurdarnar longur norður, samstundis sum arábarar vórðu eggjaðir til at flyta hagar ístaðin. Nú stýrið í Bagdad er fallið, vilja kurdarnir sleppa aftur til bygdirnar, har teir einaferð búðu, og hetta hevur nú elvt til trupulleikar.

Sambært The New York Times hava leiðarar í kurdiskum felagsskapum biðið limir sínar geva arábarunum boð um at flyta úr bygdunum innan tríggjar dagar, og hetta skulu amerikanararnir hava góðtikið.

– Vit hava fingið boð frá flokki okkara um, at fólk skulu flyta aftur hagar, tey upprunaliga búðu, og hesum boðum fylgja vit, sigur næstformaðurin í kurdiska flokkinum PUK við The New York Times.



*Fleiri arábarar har norðuri í Irak hava eins og hesin maðurin fingið sær vápn, so teir kunnu verja seg ímóti kurdunum.*

### Turkaland hóttir

Eisini turkmenararnir har norðuri í Irak kæra seg um, at teir fáa ikki frið fyri kurdunum. Sagt verður, at nógvir turkmenar hava útvegað sær vápn, so teir kunnu verja seg, og Turkaland hevur boðað frá, at gera kurdarnir seg inn á turkmenararnar, fer Turkaland at senda hermenn til økið at forða áganginum.

Amerikanararnir hava roynt at sissa turkar við at siga, at amerikanski herurin fer at átaka sær at skipa fyri friði í Kirkuk.

Amerikansku hermenninir royna eisini at fáa partarnar at samstarva, og sunnudagin eydnaðist tað at skipa eitt ráð við átjan umboðum, seks kurdum, seks arábarum og seks turkmenum. Uppgávan hjá ráðnum verður at forða fyri lógloysi og at endurreisa tær almennu tænasturnar, men enn hevur ráðið ikki havt sín fyrsta fund.

# Leita nú eftir hópoyðingarvápnum

**Nú irakska mótstøðan er at kalla burturi, hava amerikansku hermenninir hert leitingina eftir hópoyðingarvápnum hjá Saddam-stýrinum. Kríggið sjálvt hevur ikki avdúkað nøkur tílík vápn**

HÓPOYÐINGARVÁPN
*Árni Joensen*

Fyri hvønn dag sum gongur, veksur trýstið á stjórnina í Washington um at leggja fram prógv fyri, at Irak veruliga hevur hópoyðingarvápn. Tí so leingi eingi tílík vápn eru funnin, stendur trúvirðið hjá bæði George W. Bush, forseta og Tony Blair, forsætisráðharra í váða. Tað vóru júst hesi vápnini, sum vóru tann almenna grundgevingin fyri at leypa á Irak.

Fyrradagin kunngjørdi amerikanska herleiðslan í Qatar, at hon hevur sett sær fyri at leita eftir hópoyðingarvápnum á 36 støðum ymsastaðni í Irak. Talan er um ein part av teimum støðunum, sum amerikanarar hava nevnt fyrr sum møguligar hópoyðingarvápnagoymslur so sum rannsóknarstovur, verksmiðjur og herstøðir.

Í verjumálaráðnum Pentagon vóna tey, at leitingin fer at geva úrslit skjótt, men tey hava kortini nevnt, at arbeiðið kann fara at taka ein mánað.

Teir amerikansku og bretsku hermenninir hava fleiri ferðir boðað frá, at teir hava sæð tekin um, at Irak fjalir hópoyðingarvápn. Teir hava funnið eitt nú gassmaskur, serligar trygdarbúnar og evni, sum eru ætlað at verja ímóti gasseitran. Fleiri ferðir hava teir tikið royndir av tí, sum teir hava funnið, men eins og vápnaeftirlitsmenninir hjá ST eru teir hvørja ferð komnir til ta niðurstøðu, at talan var kortini ikki um hópoyðingarvápn, men heldur okkurt evni ímóti illgrasi ella okkurt annað lógligt evni.

### Ikki í iva

Stjórnin í Washington er kortini ikki í iva um, at hópoyðingarvápnini eru onkunstaðni. Stjórnin sigur, at bæði amerikanskar og bretskar fregnartænastufrágreiðingar vísa, at irakar hava fingist við at gera bæði evnafrøðilig og lívfrøðilig vápn.

At hermenninir ikki hava funnið nøkur slík vápn kemst av, at irakar eru vorðnir sannir meistarar í at fjala tey, siga talsmenn hjá stjórnini í Washington.

– Vápnaeftirlitsmenninir hjá ST funnu eingi hópoyðingarvápn, og vit fara heldur ikki at finna tey, fyrr enn vit hava fingið møguleika at tosa við teir menninar, sum kunnu siga okkum, hvar tey eru fjald, segði Donald Rumsfeld, verjumálaráðharri, sunnudagin.

Seinastu dagarnar eru amerikansku leiðararnir farnir at finnast at Sýrialandi. Ein av orsøkunum er, at sambært amerikanarunum eru fleiri av teimum monnunum, sum vita um tey iraksku hópoyðingarvápnini, flýddir til Sýrialands.

### Óheftar eftirlitsmenn

Amerikanska blaðið Washington Post skrivaði fyrradagin, at finna amerikanararnir hópoyðingarvápn í Irak, kann USA vera bundið til at lata óheftar vápnaeftirlitsmenn kanna tað, sum funnið er til tess at vátta, at amerikanararnir siga satt. Hetta sigur blaðið seg hava fingið at vita frá keldum í Bush-stjórnini og frá vápnaserfrøðingum.

Keldurnar vísa á altjóða sáttmálan frá 1993, sum bannar londum at menna, framleiða og at goyma evnafrøðilig vápn. Irak hevur ongantíð skrivað undir sáttmálan, men tað hevur USA gjørt saman við 150 øðrum londum. Finna amerikanararnir tey óglógligu vápnini í Irak, noyðist landið at halda seg til reglurnar í altjóða sáttmálanum, skrivar Washington Post.

Sambært blaðnum hava embætismenn hjá Bush-stjórnini umrøtt sáttmálan, og hvussu ymsar reglur í honum skulu tulkast, men semja er ikki um tulkingarnar, skrivar blaðið.

Óheftir amerikanskir vápnaserfrøðingar hava mælt stjórnini til at lata altjóða eftirlitsmenn kanna og oyðileggja møgulig evnafrøðilig og lívfrøðilig vápn, verða tey funnin í Irak. Teir halda, at ein slíkur framferðarháttur hevði gjørt tað lættari hjá amerikanarum og bretum at sannført altjóða samfelagið um, at tað var rætt at fara í kríggj við Irak.